

*Aftasta rað f.v.: Hedvig Westerlund-Kapnas, Victoria Absalonsen, Katrin Reinert og Helena á Løgmansbø. Fremra rað f.v.: Ásleyg Johannessen, Mortan Ólason Vang og Jóhanna Margreta Knudsen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fróðskaparsetur Føroya:

# Fyrstu bachelor-prógvini í føroyskum

Hósdagin 10. november 2005 fingu teir fyrstu sjey studentarnir handað bachelor-prógv (B.A.-prógv) í føroyskum eftir lestur á Føroyamálsdeildini.

Próvtøkan endaði við eini B.A.-ritgerð. Tey sjey hava skrivað ritgerðir um evni sum bókmentir í bundnum og óbundnum máli, sjónleik, føroysk bygdamál og fólkanavnafrøði. Handanin var á Føroyamálsdeildini.

Prógvhandanin byrjaði við at megindeildarformaðurin, Eivind Weyhe, beyð vælkomin og greiddi frá, at eftir at lesturin á Føroyamálsdeildini varð umskipaður, soleiðis ið hann nú er skipaður sum eitt 3-ára B.A.-nám og í framhaldi av tí við einum 2-ára M.A.-námi, fingu í dag 7 teir fyrstu studentarnir prógv handað.

Síðan bað Eivind studentarnar koma upp, men segði hann, ein hevði verið kvikari enn hinir og hevði longu fingið prógvið handað, men hann vildi kortini biðja hana koma upp. Síðani bað hann Victoriu Absalonsen av Viðareiði koma upp og ynskti henni til lukku við prógvnum.

Føroyamálsdeildin vil kortini gera vart við at 3 studentar, sum hava lisið høvuðsgrein eftir teirri gomlu skipanini og hava tikið nóg nógv til at tað javnvigar við B.A., hava fingið góðskrivað tað sum B.A.-prógv.


NORDISK SAMARBEJDE

SPRÅKET

Í samband við Norðurlendsku Ráðstevnuna SPRÅKET, sum var í Føroyum 29. og 30. august 2005, vilja vit hervið hjartaliga takka teimum, sum gjørdu tað møguligt at hava hesa ráðstevnu í Føroyum, - uttan teirra fíggjarligu hjálp, hevði tað verið ómøguligt at gjøgnumført ráðstevnuna.

**Høvuðsstuðlar:**

**Nordisk Kulturfond og Mentamálaráðið**

**Aðrir stuðlar:**

Statoil Føroyar · BP · Christian í Grótinum · LÍV · Føroya Banki
Tórshavnar Kommuna · Jólamerkjagrunnurin · Norðoya Sparikassi
Føroya Sparikassi ·Tryggingarfelagið Føroyar · Farodane · Klaksvíkar Kommuna
Formula.fo · Statoil · Føroya Shell · Reproz · Norðlýsið · Estra · Atlantic Airways
Hotel Føroyar · AP-Bussar

**Ein serstøk tøkk til:**

Jógvan við Keldu, landstýrismann fyri at fáa ráðstevnuna til Føroyar
Jóannes Eidesgaard, løgmann fyri at seta ráðstevnuna,
Jógvan á Lakjuni, landsstýrismann og Heidi Petersen, løgtingskvinnu fyri at luttaka í panelinum.

norden
Nordisk Kulturfond




# Heimstræið Yggdrasil blómar enn

**Kristian Blak og manningin í Yggdrasil hava júst lagt síðstu hond á upptøkurnar til 8. fløguna hjá Yggdrasil. Bólkurin er óivað ein hin virknasti, tá tað snýr seg um at umboða føroyskan tónleik í útlondum, og talið á fløgum ber eisini boð um stór skapanarevni. Og stuttligt við Yggdrasil er, at ein grundstamma er, men greinar koma og fara, tí manningin er ikki altíð júst hin sama, men hevur skift síðani byrjanina í 1981**


Tónleikur
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*


Í 1981 framførdi ein bólkur við Kristiani Blak á odda tónleik, ið settur var til yrking eftir William Heinesen. Hetta var spírin, ið gjørdist til bólkin Yggdrasil, ið hevur navn eftir heimstrænum í norðurlendsku guðalæruni.

Og júst tað, at navnið er eftir heimstrænum, er hóskandi. Tað er neyvan nakar bólkur, ið er so virkin, tá tað kemur til at ferðast og framføra. Tað snýr seg um konsertir her heima í Føroyum, men sanniliga eisini úti í heimi, har konsertskráin hevur verið stór, tó at øll kanska ikki hava givið sær far um hesar undangongumenn, ið ferðast út í heim í heilum við føroyskum tónleiki í skjáttuni.

Av sonnum ein heimsumfatandi bólkur, ið eisini kann bólkast undir tað, ið verður nevnt world music. Men mest verður tónleikurin hjá bólkinum tó róptur jazzur ella etniskur tónleikur, ið hevur rót í føroyskum sangi og tónleiki.

Og manningin hevur enntá eisini verið eitt slag av heimsblandi, tí ofta hevur onkur útlendskur tónleikari verið partur av mannigini.

## Spírar við bløðum - nótabløðum

Og gamla træið frá 1981 spírar enn og tykist ikki merkja aldur, men enn spretta nýggj bløð – nótabløð.

Í vikuni legði manningin síðstu hond á 8. fløguna hjá bólkinum Yggdrasil.

Bólkurin hevur sum nevnt havt fleiri manningar. Bólkurin hevur í fleiri ár verið á ferð við Eivør Pálsdóttir sum sangara. Nú er bólkurin á ferð við Kára Sverrisson sum sangara. Hóast henda manning hevur spælt og ferðast í 3 ár nú, so er hetta fyrsta upptøka við hesi manning.

Og tað eru Kristian Blak og Kári, ið hava gjørt tónleikin, sum er á nýggju fløguni. Verkini hjá Kristiani eru tey verk, ið hann gjørdi til framførslu, tá Vágatunnilin varð tikin í nýtslu. Kristian er jú kendur fyri sínar grottukonsertir. Talan er um fimm verk. Kári Sverrison hevur so onnur fimm verk við.

Fløgan skal ljóðblandast í desember og kemur væntandi út í vár.

Manningin á fløguni er Kristian Blak, tangentar, Mikal Blak, bass, Brandur Jacobsen, trummur, Heðin Z. Davidsen, guitar, Kári Sverrisson, guitar og sang og Villu Veski (Fin.), soxofon.

## 25 ár

Tað eru komandi ár 25 ár, síðani fyrsti spírin til bólkin Yggdrasil sá dagsins ljós. Og tað er ikki minst í hesum sambandi, at bólkurin gevur fløgu út. Men sjálvandi eru eisini framførslur á skránni.

Enn merkist ikki aldur á Yggdrasil, men tónleikararnir eru virknir innan mangar tónleikagreinar. Og Yggdrasil breiðir seg kring heimin. Ferðast verður víða og heimstónleikurin frá bólkinum við navni eftir heimstrænum breiðir seg kring heimin.

Upptøkurnar eru lidnar og komandi ár er enn ein fløga á handilshillunum. Enn ein krúna er sett á verkið – heimstræið.